# India

við indisku strondini. Føroyingar útfluttu longu tá bátarnar til Spania og Vesturafriskansku strondina. Dr. M. Sakthivel anbefallaði indisku stjórnini at brúka føroyska sniðið og setti seg í samband við Guttorm Djurhuus, sum eigur Marine Plast í Føroyum«.

»Fiskivinnudeildin vildi royna bátarnar og bað um nakrar royndar bátar. Trý snið av Kaldbaksbátunum vóru send til India, hvar fiskimenninir royndu teir. Teir fyritrektu bátin við motori«.

»Eitt virki varð sett á stovn, og ein maður fór til Føroya til tekniska upplæring«.

»Ein leiðari var settur, men tað vísti seg, at hann hevði ov nógvar aðrar interessur og var ikki rættuliga kommittaður. Hetta vistu vit ikki beinanvegin, men tað bleiv meir og meir klárt við tíðini. Serliga tá trupulleikarnir byrjaðu at stinga seg upp.

Guttorm Djurhus kravdi ymiskar facilitetir til arbeiðsfólkið, wc og líknandi - tú veit skandinavar hava hesi næstan sosialistisku idealir.

Hann kravdi eisini ein ávísan kvalitetsstandard. Skjótt kom tilfar inn, sum ikki lúkaði krøvini. Leiðarin gjørdi einki. Men Guttorm gav ordrar um, at eingin bátur mátti byggjast, um standardurin ikki var í ordan. Hann segði, at um bátar vóru bygdir við vánaligum tilfari, og ein ólukka hendi, so fóru fólk at siga, ah, tað er hatta virki langt væk úr Føroyum, sum hevur skylduna«.

Hetta var alt saman við til at økja um prísin«.

Tað vóru nógvir smátrupulleikar. Stjórnin bílegði 10 bátar. Vit bygdu teir innan 3 mánaðir. Men vit máttu bíða leingi eftir tilfarinum. Og tá tilfarið endiliga kom, var kvaliteturin út av lagi. Vit máttu senda tað aftur. Vit høvdu nógvar smátrupulleikar av hasum slagnum.

Og so vóru tað eisini figgjartrupulleikar. Bankin vildi bert veita lán, um kapitalur longu var í virkinum. So vit bóðu stjórnina um lán, men teir søgdu nei. So vit fingu onga fígging.«

Eg royndi at spyrja nærri um, hvat gekk galið. Men tað var ringt at fáa nakað beinleiðis svar. Eingin var serliga glaður fyri at práta um nakað negativt. Upp á ein máta minti hetta um at vera heima í Føroyum: Øll eru bangin fyri at siga ov nógv, og eingin vil elva til nakrar trupulleikar. Tað kann eg seta meg inn í. Men hinvegin, so var hendan verkætlanin so lítil, og tað snúði seg ikki um tann stóra kapitalin. Vit tosa um eina verkætlan, sum í indiskum høpi svaraði til ein mýggjabita á einum elefanti.

Aftan á hálvan annan tíma avgjørdi eg at skifta evni og spurdi, hvønn fyrimun teir føroysku bátarnir høvdu. Vóru tað nakrir tekniskir fyrimunir?

Men her fekk eg heldur einki svar. Ístaðin byrjaðu teir algoystir at tosa tamilskt millum sín.

Eg legði upp í og segði:

– Ímynda tær, at eg eri ein indiskur fiskimaður og kann velja ímillum ein traditionellan katamaranbát ella ein føroyskan glastrevju bát. Hvønn vildi eg valt?

Isaac segði: Tað kemur ann upp á status.

So lupu Kaliyamurthy og Muthuswamy inn í kjakið og brutu Isaac av. Og í einum blandingi av tamilskum og enskum og partvíst við meg, partvíst sínamillum, fór kjakið heilt út av sporinum.

So segið Isaac.

»Sjálvt um fiskimenninir fáa ein nýggjan bát, so vilja teir ofta halda á fram við at fiska, har teir eru vanir at fiska og brúka somu net, sum teir altíð hava brúkt. Tað einasta sum hevur broytt seg er, at teir hava fingið ein nýggjan og annarleiðis bát. Teir fiska ikki neyvendugvís meira og tjena tí tað sama. Um teir mugu taka eitt bankalán fyri at keypa føroyska bátin, so vilja teir heldur brúka katamaranin. Men um tað almenna gevur teimum stuðul, so føroyski báturin kostar tað sama sum katamaranurin, so vildu teir heldur brúkt føryska bátin.«

– Hví vildu teir heldur valt ein føroyskan bát? spurdi eg.

Kaliyamurthy svaraði:

"Føroyski báturin var høgligari at arbeiða við. Fiskimennirnir kundu vera turrir í bátinum. »Á katamaraninum blivu teir vátir«.

»Tað var eisini lættari at fáa hann út av strondini. Katamaranurin kravdi minst eini 4-5 fólk til at skumpa hann út.«

Muthuswamy legði aftur-at:

Við katamaraninum máttu teir byrja klokkan hálvgum fimm. Við føroyska bátinum kundu teir byrja klokkan sjey. Og tá dagurin var komin at enda, høvdu teir fiskað líka so leingi sum hinir við katamaraninum.

Tað var farið at skíma, og tíð var at fara heim til hotellið aftur.

Tað var løgið at koma allan vegin til India, ganga inn í ein bakgarð og so detta fram á fleiri føroyskar Kalbaksbátar undir einum træ. Føldi meg sum ein ærkæolog, ið hevði funnið eitt víkingaskip, sum enn var í góðum standi. Spurningarnir boblaðu upp. Men tað var ringt at fáa nakað beinleiðis svar upp á, hvat var gingið galið.

Vantandi fígging og ein vánaligur leiðari, sum ikki rættuliga var kommittaður til verkætlanina var allarhelst orsøkin til, at alt steðgaði upp. Tað eru uttan iva fleiri søgur at siga um Kaldbaksbátarnar í India. Hvussu er og ikki, so liggja teir føroysku bátarnir enn við Suðurindisku strondina. Væl vardir av einum stórum træ og tveimum tedrekkandi vaktarmonnum.




*Her í garðinum á verksmiðjuni uttan fyri Madras liggja fleiri føroyskir bátar – sum í einum bátakirkjugarði*




*Uttan fyri fyrrverandi glastrevjaverksmiðjuna*



*Hóast goymdir og gloymdir eru føroysku glastrevjabátarnir í góðum standi*